

*Teir hava nógv at práta um – teir tríggir Eggin Poulsen, Hallur Samuelsen og Dion Hansen – og aðrir við teimum*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Teir tríggir á beinkinum

**- Hetta er eitt gott stað at frætta tíðindi úr hinum endanum á bygdini, siga teir tríggir menninir á »Palleba Bænk« í Miðvági**

HUGNALØTA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Miðvágur:** - Ja, her verða nógv ymisk evni tikin fram, bæði um eplir, hoyggj, fiskivinnu og annars hvat rørir seg manna millum, siga teir tríggir Eggin Poulsen, Hallur Samuelsen og Dion Hansen.

Ein góðan dag í farnu viku høvdu teir aftur leitað sær á henda vældámda beinkin á Ryggi til eitt prát.

Hetta er nærum vorðin gerandiskostur hjá teimum at hittast her – nakað sum teir næstan mugu gera hvønn einasta dag og mangir aðrir við teimum.

Hjá mongum teirra hava teir eina fasta skipan til dagin: Fyrst fara teir ein gongutúr, og hittast so á beinkinum at hvíla sær beinini og práta saman um mangt og mikið.

– Vit sita her til einaferð út á fyrrapartin. Ja, so fáa vit eisini fylgt við, hvussu langa kaffipausu summi fólk hava!, siga teir skemtandi.



*Leivur Hansen er komin allan vegin úr Sandavági at hitta hesar vælorienteraðu menninar*

Tað er kortini ikki bert fyrrapartar at bonkurin er upptikin. Kvøldið fyri gekk prátið so gott, at teir vistu ikki av tíð, fyrrenn klokkan var farin at nærkast 10.

### Tvey álvarsmál

Henda morgunin, ið Snoddi koyrdi framvið vóru tvey rættiliga ólík evni til »viðgerðar«: Fótbóltur og grindadráp.

Kvøldið fyri hevði HB tapt rættiliga óvæntað í Fuglafirði, og henda dagin lá mjørkin tjúkkur yvir høvuðsstaðin. Tvær slíkar hendingar fara heldur ikki aftur við borðinum uttan viðmerkingar.

– Hetta er ein góður dagur, sigur ein teirra brosandi. Hinir flenna við.

Eitt annað av stóru evnunum var grind og grindadráp. Er tað nakað sum fólkið í Miðvági man leingjast eftir, er tað júst hetta.

Støðan við grindadrápi í Miðvági minnir kanska ikki sørt um døglingin í Mykinesi, sum hvarv á sinni, tá fólk tosaðu ilt um hann: Her í Miðvági er eingin grind deyð tey seinastu fýra árini. Og tað er alt ov long tíð.

– Alt gjørdu hesir serfrøðingar: Henda seinasta grindin, sum er Guds gáva var komin næstan inn á sandin, har drápið skuldi vera.

– Men hann snari tann til: Tá komu tey klóku brádliga og forlangaðu, at ein sendari skuldi festast á hvalirnar. Tað var so eitt, men tað ringasta var kortini tað, at teir síðani vórðu riknir til havs aftur. Tað var betri ógjørt, eru teir tríggir samdir um.

Prátið gongur eina løtu aftrat. Tá kemur brádliga ein bilur koyrandi framvið beinkinum. Í bilinum situr ein maður, sum eisini fegin vil frætta og koma við tíðindum.

Hesin fyrraparturin man eisini fara at ganga skjótt!

## MB reisti seg aftur

Eftir at hava ligið nærum í dvala í samfull 11 ár og við stórari skuld, hevur Miðvágs Bóltfelag nú reist seg aftur. Við stórari vælvild frá bygdaráðnum er felagið í dag skuldarfrítt, og er nú ført fyri at skapa fíggjarligar møguleikar fyri at øll liðini fáa bestu umstøður til fótbóltin.

Ein partur av hesum ætlanum er arbeiðið á øllum MB-økinum, sum eftir ætlan skal verða liðugt í 2011, tá næsta vestanstevnan verður í Miðvági. Hetta fer at verða millum bestu og flottastu ítróttarøki í landinum.

MB hevur annars 103 ár á baki. Tað varð stovnað 22. januar í 1905 av sonevnda fótbóltsprestinum Carl Johansen. Í dag eru umleið 400 limir í felagnum og 170 virknir limir bæði í mansdeildunum og kvinnudeildunum.

## Gøtufótbóltur í Miðvági

Sunnudagin verður, sum nakað heilt nýtt, gøtufótbóltur á vestanstevnu, har lið úr øllum Føroyum kunnu melda til. Spælt verður á fýra vallum ísenn, tað er: at átta lið dystast samstundis. Hvør dystur varir í 5 minuttir. Tann, sum vinnur, flytur alla tíðina uppeftir, og tað ræður um at vinna á vølli nr. 1, tá seinasti dysturin verður leiktur.

Fimm leikarar, umframt ein eykaleikari, kunnu vera hvørjum liði. Byrjað verður við smápiltum klokkan 12, og verður endað við monnunum, sum byrja klokkan 15.30. Øll vinnandi liðini fáa heiðursmerki.

## El-Hockey í Bygdarhúsinum

Rørslutarnað og onnur fáa á vestanstevnu møguleika at royna, um el-hockey er nakað fyri tey.

Erhard og Marianna Frederiksen fara, saman við soninum Jón at vísa hvussu el-hockey verður spælt. Jón spælir el-hockey í Danmark, sjálvt um hann er hart raktur av vøddasvinn. Erhard, Marianna og Jón búgva í Danmark.

El-hockey verður spælt í serbygdum ítróttarstólum, sum kunnu koyra upp til 14 km/t. Hetta er ein ítróttur, sum verður spældur av fysiskt rørslutarnaðum, sum oftast hava eina av fylgjandi prognosum: vøddasvinn, spasticitet, liðagikt, ryggmergsbrokk og dvørgar.

Tað eru 13 el-hockey feløg í Danmark, og sum spæla el-hockey í trimum deildum.